

www.oljan.fo

**Jan Müller** 28 - 08 - 2013

# Norra letur upp fyri leiting í Barentshavinum

Norska stjórnin hevur í dag latið upp fyri leiting í einum stórum parti av Barentshavinum, sum svarar til Sweits í stødd. Oljufeløg verða biðin um at peika út leitiøki tey vilja hava áhuga fyri í komandi útbjóðingarumfarinum. Vert er her at bíta merki í, at bæði tey føroysku oljufeløgini, Faroe Petroleum og Atlantic Petroleum hava eisini møguleika at vera partur av komandi útbjóðingini, nú bæði feløgini longu hava fingið fótin fastan á norska landgrunninum. Komandi 23. útbjóðing í landssynningspartinum av Barentshavinum fevnir um eitt øki uppá 44.000 ferkilometrar. Tað er hetta økið, sum Norra og Rusland stríddust um, men sum fyri kortum semja fekst um. Metingar siga, at her finnast 1,9 mia. tunnur av olju ella kanska serstakliga gassi. Hetta verður fyrstu ferð síðani 1994, at Norra letur upp eitt heilt nýtt øki til leiting á landgrunninum. Útbjóðingin fevnir eisini um øki í Norskahavinum og longur norðuri. Herfyri søgdu fleiri stór oljufeløg frá, at tey vórðu hugað fyri at keypa seismikk frá norsku myndugleikunum fyri nettupp at kunna vera við í leitingini í hesum økinum av Barentshavinum. Norska oljuumsitingin sigur í skrivi í dag, at freistin at lata inn umsóknir er 14. januar 2014. Tíðindini um nýggju útbjóðingina í Barentshavinum er eitt týðandi vegamót í spurninginum um at lata upp fyri leiting eftir olju og gassi í undirgrundini í Arktis.